# Vit eru klárir at taka ímóti Norrønu



*Per Kristensen, loðsur á Havnarskrivstovuni í Hanstholm, sigur, at teir eru klárir at taka ímóti nýggju Norrønu leygardagin*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*

**Fakta um nýggju Norrönu**

Longd 164,5 m
Breidd 30 m
Deyðvekt 4.300 tons
Ferð 21 míl
Høvuðsmotorar 30.000 HK
Bógskrúvur 6.000 HK
Ferðafólk 1.482
Manning 118
Bildekk 800 bilar ella 130 trailarar
Tyrlupallur
Stabilisatorar

Ferðafólkakømur:
Suita 1
2-seingjar luksuskømur við útsýni 12
2-koygggjukømur við útsýni 93
3-koyggjukømur við úsýni 28
3-koyggjukømur 12
4-koyggjukømur fyri rørslutarnað 6
4-koyggjukømur við útsýni 31
4-koyggjukømur 135
6- & 9-koyggju couchettir 324
Ferðafólk tilsamans 1.482

**Á havnarskrivstovuni í Hanstholm eru teir klárir at taka ímóti nýggju Norrønu, sum á fyrsta sinni stevnir inn í havnina leygardagin. Tá er Norrøna størsta skipið, sum nakrantíð hevur verið í Havnini í Hanstholm**

NÝGGJA NORRØNA
*Eirikur Lindenskov*

**Hanstholm:** Á havnarskrivstovuni í Hanstholm eru teir ikki í iva.

– Vit eru klárir at taka ímóti nýggju Norrønu, staðfestir Per Kristensen, loðsur á havnarskrivstovuni.

Hann sigur, at Norrøna er eitt sera stórt skip. Hon fyllir tvær ferðir so nógv sum gamla Norrøna. Innsigligin til havnina í Hanstholm er 65 metarar breið, meðan Norrøna er 30 metar, so har eru einir 17 m til hvørja síðu.

– Men tað er nóg mikið, staðfestir Per Kristensen. Men hann vísir kortini á, at Norrøna er eitt flatbotnað skip, sum ikki er eins lætt at halda á kós, sum eitt skip við kjøli, og tað tekur nógvan vind á seg, og tað er tað, sum onkuntíð kann fara at vera eitt problem..

– Vit skulu eisini hava í huga, at skipið fortreingir 30.000 tons av vatni – og tað kann merkjast inni í havnini.

Norrøna verður størsta skipið, sum hevur verið í Havnini í Hanstholm.

Loðsur verður ikki umborð, tá skipið kemur í havn, men skiparin hevur neyvt samband við loðsarnar á Havnarskrivstovuni, og hann sær alla tíðina, hvussu stór frástøðan er millum ymsu pierarnar, tí alt er væl uppmerkt og skrásett við eini telduskipan, so skiparin alla tíðina sær tað.

Í samband við nýggju Norrønu hava teir verið noyddir at dýpa havnina nakað. Innsiglingin er 10,5 m djúp og havnin er annars 8,5 m djúp.

Teir hava júst dýpt havnina eitt sindur meira, serliga til Norrønu og stóru trolararnar, sum koma har. Nógvur sandur legst í havnini, so tað er altíð neyðugt at pumpa sand, og pumpa teir í miðal 150.000 tons av sandi úr havnini um árið.

Undir sandinum er kálk, og kálkið er sera hart, líka hart sum granitt, sigur Per Kristensen.

# Norrøna

*Bjarni Djurholm*

Sum landsstýrismaður í vinnumálum havi eg verið sera spentur og áhugaður í hesum tí størsta projektinum í Føroya søgu. Tá farið verður undir slík stór tiltøk, slepst sjálvdan undan trupulleikum á vegnum, og er hetta stóra tiltakið ikki sloppið undan í so máta, men hóast hetta, so er vunnið á trupulleikunum, og sjálvt tað, at skipasmiðjan kom í fíggjarligar trupulleikar, hevði ikki seinkingar av týdningi við sær.

Tann føroyski búskapurin er í stóran mun domineraður av fiskivinnuni, og hava tí nógvar royndir verið gjørdar at fjøltátta búskapin, og er hetta tiltakið júst eitt stig á hesi leið. Hendan verkætlanin vil í heilt stóran mun stiðja uppundir tað arbeiði, sum verður gjørt at menna føroyska ferðavinnu.

Tá tað snýr seg um um flutning millum Føroyar og útheimin, so hava vit, sum er, eitt vælútbygt flutningsnet, og við nýggju Norrønum taka vit eitt risafet longur framá. Í hesum sambandi er tað serliga at fegnast um, at eisini íleggjarar uttan fyri Føroyar hava ein stóran leiklut í hesum tiltaki. Tað er nevniliga umráðandi, at føroyskar fyritøkur kunnu fáa møguleika at útvega sær fremmandan kapital, og at útlendingar síggja Føroyar sum eitt áhugavert land at gera íløgur í.

Vit hava nú fingið eitt stórfingið og snotiligt far í føroyska flotan. Eftir hvat eg kann meta um og havi hoyrt, so er alt frágingið væl og virðiliga og hava øll, sum hava verið við í byggingini og projektinum sum heild, stórt rós uppiborið.




Í sambandi við byggingina av Norrønu eru gjørdar stórar íløgur í havnirnar, har sum Norrøna fer at sigla til, og hava tí myndugleikarnir og eigararnir av hesum havnum gjørt sítt íkast til fremjanina av hesum stóra tiltaki, og skulu tey hava stóra takk fyri tað.

Eg kann hugsa mær, at hetta er ein stórur dagur hjá verandi leiðsluni í Smyril Line, og at hetta er ein krúna á verkið hjá henni. Leiðslan við Óla Hammer á odda og starvsfólkini øll hava gjørt eitt megnar arbeiði at uppbyggja eina rutu her í Norðuratlantshavi, sum bindur heili 5 lond saman í eitt rutunet, bæði tá tað snýr seg um fólka- og farmaflutning.

Eg skal ikki gera meira burturúr enn at ynskja starvsfólkunum, leiðslu og nevnd í Smyril Line, Flender Werft og øllum hinum luttakarunum í projektinum tillukku við hesum stásiliga skipi og Smyril Line góða eydnu í virksemi teirra framyvir.

Hjartaliga tillukku



# Ongin hjálp at finna

**Málið um Rosalie Thomsen, sum er víst úr Føroyum, er fevnt av tagnarskylduni, og tí fæst onki at vita um, hvat hægsti myndugleikin á økinum heldur um málið. Tað gongur fram av svari í Fólkatinginum. Tað einasta Bertel Haarder, ráðharri við útlendingamálum, vil siga, er at yvirtøkan av útlendingaøkinum heldur fram**

ÚTVÍST
*Ingi Rasmussen*



*Rosalie Thomsen fær ikki verið í Føroyum við sínari familju.*
*Mynd: Jens K. Vang*

Ongin hjálp var at finna hjá Rosalie Thomsen í donsku ráðharrastovunum.

Málið um filipinsku kvinnuna, sum er víst úr Føroyum, varð reist í Fólkatinginum av Tórbjørn Jacobsen, fólkatingsmanni, við einum fyrispurningi til Bertel Haarder, ráðharra við innferðar- og útlendingamálum. Men onki svar fekst frá ráðharranum. Hann verjir seg við, at hann hevur tagnarskyldu í slíkum málum.

### Víst úr Føroyum

Rosalie Thomsen, sum hevur filipinskt pass, er víst úr Føroyum, hóast hon hevur varandi uppihaldsloyvi í Danmark og er gift føroyskum manni.

Tey hava búð í Danmark í átta ár, og ætlaðu sær at flyta til Føroya at búgva. Áðrenn Rosalie kom til Føroya, var hon í útlendingastýrinum, har hon vísti pass og uppihaldsloyvi fram, og greiddi frá, at hon og maðurin, sum er føddur í Føroyum, ætlaðu sær til Føroya. Har fekk hon at vita, at hon hevði frítt at fara og nýttist ikki visumloyvi.

Í Føroyum fekk hon eitt barn afturat í mars mánað, og hon og maðurin ætlaðu at búseta seg í Føroyum. Men tá hon fekk arbeiði í Føroyum, gjørdust myndugleikarnir varugir við, at hon onki arbeiðs- og uppihaldsloyvi hevði.

Alt endaði við, at hon varð víst av landinum. Hon skal vera av landinum innan 10. apríl, og aktar hon ikki boðini, kann hon fáa fongsul í eitt hálvt ár, varð greiði boðskapurin frá sama útlendingastýri, sum hevði givið henni loyvi at fara.

### Eymar upplýsingar

Útvísingin vakti ans, tá Sosialurin skrivaði um hana, og Tórbjørn Jacobsen fólkatingsmaður setti ráðharranum fimm spurningar um málið í Fólkatinginum. Spurt er millum annað, hvør orsøkin er til, at Rosalie Thomsen er víst úr landinum, hóast hon fyrst hevði fingið munnligt loyvi. Spurt var eisini, um ráðharrin fór átala handfaringina hjá útlendingastýrinum og annars taka stig til, at hon fekk loyvi at vera verandi í Føroyum. Men onki ítøkiligt svar fæst, gjørdi ráðharrin greitt, tá hann svaraði í Fólkatinginum fríggjadagin 4. apríl.

Bertel Haarder sigur í svarinum, at tað ikki er gjørligt at svara innan fyri teir karmar, sum eru galdandi fyri spurningar, ið verða settir fram í Fólkatinginum. Svarið hevði innihildið eymar upplýsingar um eitt ítøkiligt útlendingamál, sum er vart av tagnarskylduni, sigur ráðharrin.

### Yvirtøka heldur fram

Føroyski fólkatingsmaðurin fær kortini svar upp á tann politiska spurningin. Hann spurdi, hvat ráðharrin helt um føroyska ynskið at yvirtaka útlendingaøki.

Bertel Haarder vísir til yvirlýsingina, sum løgmaður og forsætisráðharrin undirskrivaðu 14. januar 2002, har tað gekk fram, at danska stjórnin er sinnað at samstarva um yvirtøkur, ið ikki ganga ímóti grundlógini.

Á einum fundi 7. februar 2002 avtalaðu integratiónsráðharrin og føroyski løgmálaráðharrin, at ein arbeiðsbólkur við donskum og føroyskum embætisfólkum varð settur at gera eitt upprit, sum seinni skuldi til politiska støðutakan.

Hesin arbeiðsbólkur er fyri tíðina við at gjøgnumganga teir rættarligu og fyrisitingarligu spurningar, ið knýta seg at einari yvirtøku. Sostatt eru ongar broytingar í støðuni hjá donsku stjórnini til spurningin um yvirtøku av útlendingaøkinum, sigur danski ráðharrin.

# Psykiatriska økið afturútsiglt

**Psykiatriska økið er afturútsiglt á næstan øllum økjum. Við hesari heilsan leggur Bill Justinussen upp til aðalorðaskifti í løgtinginum um heildarpsykiatri í Føroyum. Ein stórur trupulleiki eru umstøðurnar, sum sálarsjúk, ið eru innløgd, mugu liva undir.**

HEILDARPSYKIATRI
*Ingi Rasmussen*

Viðurskiftini hjá teimum sálarsjúku í Føroyum eru langt frá nøktandi.

Tað gongur týðiliga fram av frágreiðingini, sum Bill Justinussen, landsstýrismaður, hevur lagt fyri løgtingið í sambandi við aðalorðaskiftið um heildarpsykiatri í Føroyum.

Í frágreiðingini gongur eitt nú fram, at Løgtingsins umboðsmaður hevur verið á eftirlitsvitjan á psykiatriska deplinum á Landssjúkrahúsinum í oktober 2002. Í frágreiðingini, sum hevur verið til hoyringar hjá Familju- og heilsuráðnum, átalar umboðsmaðurin fleiri viðurskifti, sum sálarsjúk og liðugt viðgjørdir sjúklingar á psykiatriska deplinum liva undir.

Umframt at bygningarnir eru í sera ringum standi, vísir umboðsmaðurin á tann stóra trupulleika, at eini 40 til 50 seingjarpláss av teimum 70, sum er til taks á psykiatriska deplinum á Landssjúkrahúsinum, verða nýtt til bústað hjá sjúklingum, ið ikki hava tørv á at vera innlagdir. Orsøkin til at fólkini búgva á deplinum er, at ongi onnur bústaðartilboð eru til hesi fólkini.

– Hesi viðurskifti eru ein afturvendandi trupulleiki, tá ið arbeitt verður við at finna loysnir á psykiatriska deplinum, og hetta virkar stagnerandi fyri allan depilin, sigur Bill Justinussen, landsstýrismaður.

Bústaðartrupulleikin eru bara ein av fleiri. Nú Bill Justinussen hevur skipað fyri aðalorðaskifti um heildarpsykiatri í Føroyum, ger hann púra greitt, at skal nakað munagott henda, má ein peningajáttan fylgja við. Og henni borga politikararnir fyri.

– Um landsins myndugleikar ynskja, at tað skal arbeiðast fram ímóti at kunna bjóða eitt heildarpsykiatriskt viðgerðartilboð í Føroyum, verður samstundis neyðugt at økja um fíggjarligu játtanina til tey sálarsjúku, tí staðfestast kann, at tað psykiatriska økið er afturútsiglt á næstan øllum økjum, sigur Bill Justinussen.

Aðalorðaskifti um heildarpsykiatri er sett á dagsskránna fyri tingfundin í dag, týsdagin 8, apríl klokkan 10.00.

## Framtaksnevndin fullmannað

**Nevndin fyri Føroya Framtaksgrunn hevur skipað seg við Dagmar Joensen sum forkvinnu. Hans Andrias Joensen, stjóri í Thor, varð valdur fyri Carl á Lag, sum tók seg úr nevndini, og fríggjadagin valdi nevndin Árna M. Dam afturat**

FRAMTAKSGRUNNURIN
*Ingi Rasmussen*

Nevndin fyri Framtaksgrunnin stendur fyri stórum avbjóðingum. Sølan av Fiskavirking og Fiskasøluni liggur ikki so langt burturi, og fleiri áhugaðir keyparar sigast at vera bæði í Føroyum og uttanlands.

Teir fýra limirnir, ið landsstýrismaðurin við vinnumálum hevur valt í nevndina fyri Framtaksgrunnin, valdu á nevndarfundi fríggjadagin Árna M. Dam upp í nevndina.

Nevndin hevur skipað seg við Dagmar Joensen sum forkvinnu og Árna M. Dam sum næstformanni. Hini í nevndini eru Hans Andrias Joensen, Sjúrður Horsdal og Eyðna Justinussen.

Carl á Lag var annars júst valdur í nevndina fyri Niels Winther Poulsen, sum legði frá sær. Men Carl á Lag valdi beinanvegin at taka seg aftur.

– Tað hevur verið mótmælt frá pørtum av vinnuni, og eg føli eisini okkurt frá politiskari síðu. Eg havi ongan hug at draga mín persón, mína familju ella mítt virksemi ígjøgnum rumbul, og tí havi eg sagt meg úr nevndini.

Bjarni Djurholm hevur tikið støðuna til eftirtektar og valdi Hans Andrias Joensen úr Thor í Hósvík í nevndina í staðin.